## Ganstara rapparar til Føroya

Kendi danski rapp-bólkurin "Suspekt" kemur til Føroya komandi vikuskiftið. Framførslur verða í Eclipse fríggjakvøldið og í TB-húsinum leygarkvøldið. Bólkurin kemur úr harða umhvørvinum í Albertslund og ger tónleik, ið nevnist gangstararap. Harðaur rapptónleikur við einum sterkum stíli bæði hvørjum tónleiki og teksti viðvíkir. Seinasta útgávan hjá Suspekt, Prima Nocte, tók ummælarar á bóli. Bólkurin fekk eisini sera góð ummæli fyri sína konsert á Roskilde Festivalinum í fjør. Teir fingu seks stjørnur frá Gaffa. Umframt fleiri løg, sum hava verið tráðspæld í donskum útvarpi, hava teir fýra rappararnir úr Albertslund millum annað gjørt tónleik til kenda danska entertainaranum Anden umframt Drengene Fra Angora. Teir í Suspekt vóru eisini gestatónleikarar á fløguni hjá L.O.C. Tað lagið nevnist Få din flask' på. Suspekt hevur eisini arbeitt við føroyska myndamannin, Bárður Eklund. Lesið meira á www.primanocte.dk



## Nýtt frímerki í Klaksvík

Mánadagin 18. februar 2008 byrja Torradagarnir í Klaksvík, og lagt verður fyri á posthúsinum. Postverk Føroya hevur givið út nýtt frímerki í samband við at Klaksvíkar Kommuna verður 100 ár í 2008, og Steinbjørn Jacobsen fer at avdúka frímerkið mánamorgunin kl. 11.00. Eftir avdúkingina verður móttøka á posthúsinum og Edward Fuglø fer at signera fyrstadagsbjálvar við Klaksvíksfrímerkinum. Allar Torradagarnar verður ein framsýning á posthúsinum um postleiðir. Postverk Føroya vónar at nógv fólk fara at leita inn á posthúsið í Klaksvík hesar dagar.

# Óli skrivað fimmti Miðvikur

**Óli Jacobsen hevur higartil skrivað 200 síður við siðsøguligum tilfari í Miðvikuni í Sosialinum hvønn mikudag. Í dag prenta vit Miðviku nummar 50**

BLAÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Seinasta árið hevur Óli Jacobsen skrivað 200 síður av siðsøguligum tilfari í Miðvikuni – fýra síður í Sosialinum hvønn mikudag. Umframt nógv annað tilfar eisini hevur Óli skrivað 35 greinar í røðini "Hendur ið sleptu", sum er íbirt úr Gamla Kirkjugarðinum á Svínaryggi í Havn*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Miðvikan, sum er í blaðnum í dag, er nummar 50 í hesi røð við siðsøguligum tilfari. Henda skriving byrjaði í FF-blaðnum, har tað var ein táttur hjá Óla Jacobsen av mongum at fáa upp á prent mest møguligt av søguni og lagnusøguni hjá fiskimonnum og annars hjá "vanliga" føroyinginum.

- Hetta var tilfar, sum var sera væl umtókt av lesarunum og sum eisini gjørdi sítt til at skapa virðing fyri fiskimannafelagnum og fiskimonnum. Hvussu væl hetta var umtókt sást ikki minst, tá ið FF-blaðið steðgaði, sigur Óli Jacobsen.

Sosialurin metti hetta tilfar hava týdning, og tí vóru boð eftir Óla Jacobsen, sum síðani hevur havt fasta táttin, Miðvikuna, hvønn mikudag við siðsøguligum tilfari – nú í skjótt eitt ár.

Í Miðvikuni hevur framvegis dentur verið lagdur á søguna hjá fiskimonnum og fiskimannakonunum.

Greitt hevur eisini verið frá lagnusøguni hjá fiskimonnum. Tær mest kenslubornu hava verið um Acorn, Lauru og Immanuel, og so Stella Argus.

- Tað hevur eisini verið pláss fyri øðrum, sum tilfar hjá og um Petur Alberg, um Honnu og Harry Wilson, bretskur hermaður undir krígnum og nú tann higartil ókenda søgan um Daniel Jacob Danielsen í Congo, sum kann sigast at hava verið í (næst)fremstu røð í heimspolitikkinum fyri 100 árum síðani, sigur Óli Jacobsen.

Hetta er alt tilfar, sum er íkast til okkara søgu frá seinast í 1800-talinum og fram í 20. øld.

Fýra síður í blaðnum sær kanska ikki út av so nógvum. Men tilsamans er talan um 500 skrivaðar síður og afturat tí eins nógvar myndir, nógvar hava ikki verið frammi fyrr. Hetta hevði fylt tvær trivaligar bøkur.

Afturat hesum tilfarinum hjá Óla Jacobsen kemur røðin "Hendur ið Sleptu", har tað higartil hava verið 35 greinir.

- Tað tykist, sum at tað er nærum óendaligt, hvussu nógv søga, ið kann fáast burtur úr hesum gamla kirkjugarði, sigur Óli Jacobsen, sum skrivar hesa greinarøð út frá søgum, íbirtar av gravum og gravsteinum í Gamla Kirkjugarði í Havn.

Talan er um tilfar, sum er sera væl umtókt millum lesararnar á Sosialinum, og hetta er ein framúr eggjan hjá Óla Jacobsen at halda áfram.

# 130 fólk á bátafundi í Havn

**Tað var stórur áhuga fyri smábátafundinum, sum Shell og Tórshavnar Bátafelag skipaðu fyri sunnudagin**

SMÁBÁTAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sunnudagin skipaðu Shell og Tórshavnar Bátafelag fyri tiltaki fyri bátaeigarar í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í Havn. Nógv fólk møttu – tá fundurin byrjaði kl 16 var salurin fullur, tí eini 130 fólk vóru komin at lýða á.

Tiltakið byrjaði við, at Niclas Heri Jákupsson frá Shell og Kartni Olsen frá Tórshavnar Bátafelag, bjóðaðu vælkomin. Fyrstur á pallin var Marius Magnussen frá Trygdarmiðstøðini í Klaksvík. Hann greiddi frá sínum dagliga arbeiði og teimum avbjóðingum sum liggja í at hava eina trygdarmentan. Hann tók dømi millum Føroyar og Sumatra, sum hann nýliga hevur vitjað, har trygdin als ikki verður sett í hásæti.



*Marius Magnussen frá Trygdarmiðstøðini í klaksvík greiðir frá*

Ein áhugaverdur, og sera upplýsandi fyrilestur, siga fólk, sum lýddu á.

Næstur at halda fyrilestur, var Hanus Kjølbro. Hann greiddi frá sínum arbeiði at evna til og geva út bókina Veðurlæra. Á ein sera hugnaligan og gevandi máta greiddi Hanus frá um hetta drúgva arbeiðið. Hanus kom eisini inn á, hvussu man avlesur veðurkort, og hevði hetta sera stóran áhuga millum áhoyrararnar.

Eftir ein kaffisteðg, har menn eisini fingu strekt beinini, hevði Fiskirannsóknarstovan tveir áhugaverdar fyrilestrar.

Bjarti Thomsen tosaði um royndir, sum teir hava gjørt at fiska tosk við rúsum, og Kristian Zachariassen greiddi frá um royndir við snelluveiðu á Landgrunninum og á Føroya Banka.

Hetta vóru eisini tveir menn, sum dugdu væl at siga frá, og vístu teir eisini livandi myndir av fiski, sum bítur á húk, og hvussu hann kemur í rúsu. Fleiri spurningar komu frá áhoyrararnum, og tá Niclas Heri Jákupsson og Kartni Olsen endaðu kvøldið, vóru tað fleiri menn sum stungu høvdini saman, fyri at tosa um tað, sum teir høvdu hoyrt.

- Vit eru sera fegnir um hetta samstarvið við Shell og takksamir fyri, at vit kundu bjóða limum okkara til eitt slíkt gevandi og spennandi tiltak, sigur Kartni Olsen, formaður í Tórshavnar Bátafelag.



*Eini 130 mans møttu til bátafundin, sum Shell og Tórshavnar Bátafelag skipaðu fyri sunnudagin*